

*Atlantic Airways fær nú sætta flogfarið í flotan. Leiguavtala er gjørd um enn eitt BA 146-200 flogfar*

# Sætta flogfarið í flotan

**Atlantic Airways hevur gjørt leiguavtalu um eitt BA 146-200 flogfar. Magni Arge, stjóri, sigur, at við fimm flogførunum í støðugari flúgving, er tørvur á at hava eitt eyka flogfar at taka til**

FLOGFERÐSLA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

– Hetta flogfarið er fyrst og fremst roknað sum eitt backup hjá okkum. Flúgvingin hjá okkum kemur í summar at fevna um fimm flogfør, og tí er neyðugt at hava ta trygd, sum eitt eyka flogfar kann geva okkum. Bæði at seta inn, um talan verður um seinkanir ella avlýsingar. Og sjálvandi eisini, um okkurt av hinum flogførunum ikki er tøkt av einhvørjari orsøk.

Soleiðis sigur Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways, nú felagið hevur gjørt avtalu um at leiga eitt flogfar í summarhálvuni.

Við hesum telur flotin hjá føroyska flogfelagnum nú seks flogfør. Eins og við hinum fimm, so er talan um eitt flogfar av slagnum, British Aerospace. Flogfarið, sum í løtuni stendur á Prince Edward Island, er 20 ára gamalt. Í løtuni verður flogfarið málað og riggað til í aðrar mátar, og síðani verður kósin sett móti flogvøllinum í Vágum.

# Næmingar sýna fornminni

**Mánadagin 27. mars 06 kl. 16 letur upp ein serlig framsýning í skúlastovuni á Føroya Fornminnissavni undir heitinum »... tað var jómfrú Maria ... eitt dømi um samstarv millum skúla og fornminnissavn«**

FRAMSÝNING
*tíðindaskriv*

Í januar mánaði arbeiddu næmingar í 1., 2. og 3. flokki í Velbastaðar skúla við evninum "miðøldini". Ein partur av arbeiðnum fataði um kirkjubøstólarnar, og í tí sambandi vitjaðu næmingarnir tríggjar ferðir á framsýningini hjá fornminnissavninum. Teir fingu frágreiðing um gripir úr miðøld og serliga varð hugt at kirkjubøstólunum. Hvør næmingur valdi sær sín kirkjubøstól fyrst at tekna og síðan at gera stóran málning burtur úr. Næmingarnir løgdu stóra orku og neyvleika í hetta verkætlanararbeiði, og úrslitini vórðu eisini har eftir.

Heitið á serframsýningini, ... tað var jómfrú Maria ... er fyrsta regla úr eini Mariuvísu, sum næmingarnir sungu, tá ið kvøldseta var í kirkjuni í Kirkjubø á kyndilsmessu, meðan hesar vøkru myndirnar prýddu kirkjuna.

Framsýningin er úrslit av samstarvi millum Velbastaðar skúla og skúlatænastuna á Føroya Fornminnissavni og fatar um 15 stórar málningar av kirkjubøstólunum, sum næmingarnir hava málað upp á brúnt pappír í stórari støddd (uml. 60x120 cm).

Eisini verða frágreiðingar um mannagongdina í verkætlanararbeiðnum, upplestur, tær miðaldarligu lyktirnar, og ljósmyndir frá arbeiðnum, tilgongdini og myndagerðini verða sýndar á stóra løriftsskuggan.

Hvussu man gangast í Japan?

善
二
[2]

Nógv gjørdust ov sein, tá Føroya Banki fyrr í ár beyð viðskiftafólkum at gera íløgur fyri 100 milliónir krónur í lánsbræv við trygd ímóti at missa ílagda peningin. Men nú kunnu íleggjarar aftur halda seg framat í Føroya Banka.

Frá 20. mars til 7. apríl 2006 ber til at gera íløgur í nýtt lánsbræv, sum fylgir gongdini á japanska partabrævamarknaðinum. Íleggjarar fáa við vissu 1% í rentu um árið. Í mesta lagi kann rentan gerast heili 30% árliga í fimm ára gildistíðini.

Kommuninvest í Svøríki útgevur nýggja lánsbrævið, og Føroya Banki samstarvar við Nordea um útgávuna. Teknast kunnu 200 milliónir krónur hesaferð.

Vilt tú vita meira um nýggja lánsbrævið, set teg so í samband við íløguráðgevarar bankans.

FØROYA BANKI

TEAM85